# Norðurlond

5

*... tankar og broytingar í søguligu gongdini í Norðurlondum og Evropa ...*

## Mál

Eftir at kapittulin er gjøgnumgingin skulu næmingarnir kenna til *skandinavismuna* og menningina í Danmark, Noregi, Svøríki og Finnlandi í 1800-talinum.

1800 tallet på vrangen (dvd)

Í stóran mun er menningin í 1800-talinum í Norðurlondum ógvuliga lík, við *broyttum landamørkum* (millum Danmark og Eysturríki-Proysland, millum Noreg og Svøríki, millum Finnland og Russland), *mekanisering av landbúnaðinum, ídnaðargerð og demokratisering*.

Nationalisman í Norðurlondum førdi lutvíst til felagashugsanina *skandinavismuna*, lutvíst til innara split. Dømi um split er m.a. dansk-týska kríggið í 1864, upploysingin av samveldinum millum Svøríki og Noreg í 1905, tvístøðan millum svenskt- og finsktmælt í Finnlandi og finska loysingin frá Russlandi í 1917.

## Uppgávur

Uppgávurnar snúgva seg um stórbæri og broytingina í handilsflotunum, og eisini um ávirkanina nationalisman hevur á skandinavisku londini.

Uppgávan um nationalismu leggur upp til eitt samstarv við lærugreinina føroyskt.


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Segl ella eimur?

Støddin á handilsflotanum í Norðurlondum 1852-1914 (í 1000 nettotonsum)

| | DANMARK | | FINNLAND | | NOREG | | SVØRÍKI | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | guvuskip | tilsamans | guvuskip | tilsamans | guvuskip | tilsamans | guvuskip | tilsamans |
| 1852 | 2 | 103 | - | - | - | 320 | - | 204 |
| 1870 | 10 | 178 | 4 | 209 | 13 | 974 | 27 | 346 |
| 1889 | 94 | 271 | 6 | 257 | 168 | 1611 | 135 | 504 |
| 1900 | 247 | 394 | 54 | 340 | 505 | 1508 | 325 | 614 |
| 1914 | 434 | 520 | 86 | 478 | 1214 | 1784 | 750 | 901 |

1. Hvat Norðurland veksur mest um handilsflota sín millum 1852 og 1914?
2. Hvat land hevur størst tal av seglskipum í mun til guvuskip í 1914?
3. Nær á leið hava guvuskipini sligið út seglskipini úr kappingini?
4. Hvørjar vørur førdu skipini úr ymsu londunum? (Svarið finnur tú í kapitlinum Norðurlond).
5. Hvussu mundi munurin vera í Føroyum millum guvuskip og seglskip í nevnda tíðarskeiði? Brúka netið og bókasavnið at finna svarið!


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Stórur handilsfloti liggur ein vetur í lítla Öregrund

Í einum stokkhólmsblað frá 1863 stendur at lesa um henda altjóða handilsflotan, ið savnaðist í Öregrund orsaka av ringu veðurlíkindunum í Eystarasalti.

> Teir sunnan og vestan vindar, sum síðan síðst í oktober mánaði hava verið ráðandi í Botnsvík og á havinum kring Áland, hava ført til, at ein ikki heilt lítil handilsfloti upp á hálvtannað hundrað før er komin saman at kroka í Öregrund og skergarðinum har um leiðir; tað eru einamest skip og briggir frá 200 til 500 lastartons ávegis í øll heraldshorn: til Russlands, Onglands, Fraklands, Spania, Algeria, Egyptaland, Kap og Eysturindia og aðrastaðni við. Hesi trivaligu træfør liggja nú, so stásilig at sjá, og dvølja fyri veturin og prýða lítla býin, havnina har og sýnuna alla – so hábærslig liggja tey skipini, at sjógarparnir sjálvir siga mastrarnar, ið standa sum ein tjúkkur skógur yvir havnarlagnum minna ikki sørt um eina „London dokk“. Flestu skipini eru norsk, men tó eru svensk, donsk, finsk, russisk, hollensk, ensk og týsk eisini har. Skipararnir og manningarnar, ið telja minst 1.500 menn hava við bábylonska málmeldrinum, sett sín dám á býin, og er ráðandi málið á øllum almennum støðum í býnum vorðið norskt.

1. Hvat slag av skipum er tíðindagreinin um?
2. Hvaðani stava flestu skipini, smb. greinini?
3. Hvørjir aðrir tjóðskapir verða nevndir?
4. Hví liggja øll hesi skipini fyri akker í Öregrund?
5. Hvørjar fyrimunir hava guvuskip fram um seglskip? Tú kanst leita fram meiri vitan, áðrenn tú svarar hesum og næsta spurninginum.
6. Eru nakrir vansar við guvuskipum, um vit bera tey saman við seglskip?
7. Hvat man tað meinast við, tá ið tað í greinini verður tosað um „bábylonskan málmeldur“? Brúka internetið at finna svarið.
8. Skriva eina frágreiðing! Árið er 1863, og liðið er út á heystið í Öregrund. Hvussu er nú allur býurin er á tremur við fremmandum sjómonnum? Rættiliga spennandi, ella hvussu? Greið frá einum gongutúri í fólkameldrinum – ella far umborð á eitt av skipunum …



© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Eind ella syndran?

Nationalisman, sum vaks fram eftir at Napoleon varð steðgaður í 1815, førdi við sær ein longsul eftir at savna saman fólkasløg, ið høvdu felags mál, felags trúarlív og felags søgu, sum í Týsklandi og í Italia.

Í øðrum lag førdi eindarstevanin í nationalismuni til, at statir í staðin syndraðust, t.d. Eysturríki-Ungarn. Í Norðurlondum júst sum í restini av Evropa, førdi nationalisman bæði til eindarkenslu og syndran.

## Dømi um nationalismu í Norðurlondum í 1800-talinum og í byrjanini av 1900-talinum:

- Slesvík, Holstein og dansk-týska kríggið.
- Tjóðskaparkenslan í Noregi og upployslingin av Norsk-Svenska samveldinum.
- Finnland loysir frá Russland.
- Mótsetningar millum svenskt og finsktmæltu fólkabólkarnar í Finnlandi.
- Útbreidda skandinavisman.

1. Vel eitt av dømunum um nationalismu í Norðurlondum. Tú ert journalistur á einum blað, og í eini tíðindagrein skalt tú lýsa bakgrund, hendingagongd og avleiðingar av døminum, tú hevur valt tær. Orða eina hóskandi yvirskrift, skriva ein inngang og ein stuttan tekst. Hav í huga at taka fram onkra dramatiska hending, sum er viðkomandi fyri lesararnar hjá tær.
2. Hvørji dømi eru um nationalismu í Norðurlondum og aðrastaðni úti um heimin á okkara døgum?
3. Hvat kann vera positivt við nationalismuni? Hvat kann vera negativt?


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Hvør eri eg?

**Vel rætta svarið og set bókstavin í rútin.**

1. ☐ Tað var eg, sum syrgdi fyri, at Noreg fekk sítt egna flagg.
2. ☐ Tað átti at latið seg gera at rokkið Norðpólinum við at reka við ísinum. Eg brúki „eskimo-mátan" fyri at yvirliva. Um veiðieydnan er vánalig, fletta vit hundarnar.
3. ☐ Tað átti at latið seg gjørt at rokkið Japan við at siglt framvið norðurstrond Russlands. Vit fara nú við „Vegu". Ynsk okkum góðan byr!
4. ☐ Hví eg havi eina pistól? Eg eri á veg inn í bygningin hjá Bobrikov at skjóta hann. Eg geri tað fyri Finnland.
5. ☐ Eg eri fyrsti kongur Noregs, síðani landið gjørdist sjálvstøðugt.
6. ☐ Eg vil ikki sita í stjórn saman við bøndum. Fjósroykur stendst av!
7. ☐ Bøkur og royndir trúgvi eg einki uppá! Tað er betri, um næmingarnir lurta eftir fyrilestrum og kjakast.
8. ☐ Eg var fyrstur at røkka Suðurpólinum!
9. ☐ Hví valdi eg at brúka smáross sum dragdýr? Eg átti at havt brúkt hundar.
10. ☐ Sjálvt eg berjist fyri Finnlandi. Mítt vápn er tónleikurin, ikki pistólin.

**A** Eugen Schauman
**Á** Adolf Erik Nordenskiøld
**B** Kristian 9.
**D** Fridtjof Nansen
**Ð** Grundtvig
**E** Roald Amundsen
**F** Hákun 7.
**G** Jean Sibelius
**H** Oskar 1.
**I** Robert Scott


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Minnist tú?

| | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| **1.** Hvat ár byrjaði rutusiglingin millum Malmø og Keypmannahavn?<br>1) Í 1914 X) Í 1905 2) Í 1828 | | | |
| **2.** Hvat kallaðist norðurlendska tjóðskaparkenslan?<br>1) Víkingaormurin X) Skandinavisman 2) Norrøna | | | |
| **3.** Hvussu eitur finska tingið?<br>1) Lantdagen X) Stortinget 2) Duman | | | |
| **4.** Hvussu kallast tjóðarkvæði finna?<br>1) Kalevala X) Lemminkainen 2) Bobrikov | | | |
| **5.** Hvat ár varð samveldið millum Svøríki og Noreg upployst?<br>1) Í 1914 X) Í 1899 2) Í 1905 | | | |
| **6.** Hvat ár misti Svøríki Finnland til Russlands?<br>1) Í 1809 X) Í 1905 2) Í 1914 | | | |
| **7.** Móti endanum av 1800-talinum gjørdist Noreg ein stór<br>1) Landbúnaðartjóð X) Sjófaratjóð 2) Oljuframleiðaratjóð | | | |
| **8.** Í 1800-talinum gjørdist Danmark ein stór<br>1) Gassframleiðaratjóð X) Sjófaratjóð 2) Landbúnaðartjóð | | | |
| **9.** Hvat ár misti Danmark Noregi?<br>1) Í 1914 X) Í 1905 2) Í 1814 | | | |
| **10.** Syðstu partarnir í Danmark itu Slesvík og<br>1) Lubeck X) Skagen 2) Holstein | | | |



© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9

# Svar: Hvør eri eg?

1. H
2. D
3. Á
4. A
5. F
6. B
7. Ð
8. E
9. I
10. G

# Svar: Minnist tú?

| | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. | | | 2 |
| 2. | | X | |
| 3. | 1 | | |
| 4. | 1 | | |
| 5. | | | 2 |
| 6. | 1 | | |
| 7. | | X | |
| 8. | | | 2 |
| 9. | | | 2 |
| 10. | | | 2 |


© Nám 2011. Týðari: Bergur Rasmussen. Upprunaútgáva: Impuls Historia.
©Niklas Gårdfeldt Leavy och Natur & Kultur, Stokkhólmur.
ISBN: 978-99918-2-098-9